


www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 01 - 2013

# Heimsins største - Oljufelagið Exxon yvirhálar Apple

Apple er ikki longur heimsins mest virðismikla felag á virðisbrævamarknaðunum. Tað er amerikanska oljufelagið ExxonMobil harafturímóti. Statoil fekk Exxon til Føroya Heimsins største oljufelag, sum norska Statoil megnaði at fáa við í oljuleitingina við Føroyar, er nú ikki bert heimsins største oljufelag. Tað eigur eisini 1. plássið av øllum skrásettu fyritøkunum á virðisbrævamarknaðunum í heiminum. Marknaðarvirðið á ExxonMobil er 418,23 milliardir dollarar. Apple, sum yvirhálaði Exxon í 2011, hevur eitt virði uppá 413,06 milliardir dollarar. Exxon partabrævið er sambært norsku heimasíðuni e24 vert 91,44 dollarar. Við í helvtini av loyvum í Føroyum ExxonMobil er í dag partur av ikki færri enn helvtini av øllum leitiloyvum í Føroyum og er eisini við í boringini á Brugduleitimiðinum á landgrunninum, har Statoil er fyristøðufelag.